Frásøgn frá ársfundinum fyri Landsnet 2022 - á Panorama á Hotel Hafnia 20. mai 2022

Yvir 100 luttakarar vóru á fundinum fyri Landsnet 2022. Durita Hansen bjóðaði øllum vælkomnum, og borðreitt varð við smyrjibreyði, so fólk fingu eina bita undir framløgunum.

**Durita Hansen**
Durita kunnaði um skránna, at fólk kundu brúka Sli.do til at greiða atkvøðu og seta spurningar, og um ikki bar til at svar ávísum spurningum beinanvegin, so verður svarað so skjótt sum møguligt.

**Leif Abrahamsen**, Leiðsla av felags KT í tí almenna
Leif Abrahamsen greiddi frá, at tað eru avbjóðingar av at veita felags KT loysnir. At teldur og net rigga er ein fyritreyt fyri at reka landi. Á nógvum økjum eru Føroyar millum mest framkomnu lond við demokrati, skjótum neti og flest allar KT verkætlanir fungera gott. Vit hava nógv at verða errin av, og duga at gera nógv av hesum sjálvi.

Verkætlanin við at fáa flutt teldupostskipanina Exchange út í cloud er partvíst eydnað. Í fyrstani vórðu øll áhugað at vera við, men tá verkætlanin fór í gongd valdu nøkur ikki at vera við. Tí eru í løtuni tvær loysnir, men vónandi koma tey, ið koyra við gomlu loysnini eisini skjótt yvir í cloud. Viðhvørt tekur langa tíð at fáa øll á somu loysn, og 17 ár tók tað við BSL, Búskaparskipan landsins. Duga gott at grundgeva fyri felags loysnum, men mugu verða enn betri at vísa á hví, tað er lættari og betri at hava felags loysnir. Í Íslandi taka landsins myndugleikar støðu, og biðja stovnarnar seta loysnirnar í verk.

Dagsskráin er broytt nógv, aftaná at Russland leyp á Ukraina. Neyðugt er at vera meira á varðhaldi, tí er neyðugt at hugsa um, hvar okkara servarar eru, og hvar og hvussu vit goyma data. Stovnarnir mugu tí geva KTL heimild at taka avgerðir teirra vegna um at økja trygdina, fyri at vit øll kunnu verða tryggari.

**Bergur Hansen**, KT leiðari á Landsverki og formaður í Brúkararáðnum, formansfrágreiðing
Bergur tók samanum arbeiðið hjá Brúkararáðnum. Fyrri valdi formaðurin er farin, og ráðið hevur valt Berg til nýggjan formann. Í brúkararáðnum sita:

| Stovnur | Limur | Varalimur |
|---|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | Bergur Hansen | Sigurdjón Jónsson |
| Almannamálaráðið | Jógvan Højgaard | |
| Heilsumálaráðið | Allan Nolsøe | Hansa Sørensen |
| Uttanríkis- og Mentamálaráðið | Hjalmar Hansen | Noomi Rasmussen |
| Umhvørvis- og Vinnumálaráðið | Gunnleyg Árnafjall | Sólrun Gleðisheygg |
| Løgmansskrivstovan | Flóvin Ejdesgaard | Sofus Borðoy, Mortan Hentze |
| Fiskimálaráðið | Hans Albert Hansen | Rannvá Sólheim |
| Kommunufelagið (eldrasamstørv) | Lars Larsen Black | Sigrid J. Dalsgaard |
| Óheftir stovnar | Hallur Markná | |

Brúkararáðið ferð at skipa seg á næsta fundi.

Sambært starvsskipanini fyri brúkararáðið, eiga allir stovnar at hava ein úrvalsbrúkara, og úrvalsbrúkarar eiga at verða kunnaðir um, hvør limur umboðar teirra stovn. Limirnir umboða aðalráðini og umboð fyri óheftar stovnar. Bergur spurdi, hví einki uppskot er komið frá brúkarum á stovnum, sum eru limir í brúkararáðnum, hóast skriv er sent til allar stovnar um spurningar til brúkararáðið.

Av tí at nógv tíð verður brúkt á telduni, er tørvur á at deila vitan, og tí stovnar brúkararáðið eitt Teams til allar úrvalsbrúkarar, og kravið er, at øll skulu hava Teams á telduni. Øll fáa kunning, um teir spurningar ella uppskot sum eru, og kunnu tí eisini síggja svørini uppá settu spurningarnar. Møguliga kann okkurt av hesum verða veitt sum tænasta á Landsneti. Møguliga verður verkstova gjørd um POWER produktini.

Spurningur 1 - Verður Teams nógv brúkt ? - Svarið: Teams hevur verið nógv nýtt til at deila vitan.

Spurningur 2 - Til Berg frá Leif. Leif greiddi fyrst frá Governance við Skúlaneti, og at eitt strategiskt ráð varð sett, og hvat Bergur helt um tað ? Bergur spurdi um tað er neyðugt hjá Landsneti. Bergur nevndi at tað eru brúkararnar sum spyrja. Kanska Gjaldstovan skuldi haft eitt bólk til menning.

**Birgir av Steinum**, støðulýsing av Landsneti og hvar eru vit á veg
Birgir takkaði brúkararáðnum og formanninum fyri góða arbeiðið og veitarunum, fyri gott samstarv.

Tá korona varð staðfest í Føroyum, boðaði løgmaður frá, at Føroyar fóru niður í ferð, men vit á KTL fóru upp í ferð. Nógvar vegleiðingar vórðu gjørdar, so starvsfólkini í fyrisitingini kundu arbeiða heima, og hetta varð serliga gjørt á Teams.

Hóast korona eru 3 nýggir stovnar innlimaðir í Landsnet og gott 500 fleiri brúkarar, harav omanfyri 100 eru vanligir brúkarar, 143 eru sokallaðir lættir brúkarar, m.a. á vegadeildini á Landsverki og á Almannaverkinum eru omanfyri 250 brúkarar.

Roknskaparliga vísir innanvirkis roknskapurin hjá KT Landsins, at stórur partur av útreiðslunum hjá Landsneti er sáttmálar, verkætlanir og lisensir. Neyðugt er at gera tillagingar, tí m.a. lisensirnir hjá Microsoft eru dýrkaðir nógv. Prísurin er tvífaldaður samanborið við prísin fyri 10 árum síðan, og sjálvt um tað er bíligari at verða í Cloud, so slepst ikki undan príshækkingum.

Av nýggjum tænastum er Skjalhald eitt stórt frambrot. Darktrace tryggjar at ansa verður eftir ferðsluni á netinum, eisini meðan øll á KT Landsins luttaka á ársfundinum, nýggj dátuviðgerðaravtala gjørd, ið flestu hava undirskrivað og 11 dátugrunnar eru fluttir yvir á SQL hotell.

**Kim Hansen**, rammusáttmálin
Rammusáttmálin er fyri innkeyp av telduútgerð og tilhoyri. Veitarin er KT Húsið, og sáttmálin er galdandi fyri allar stovnar, eisini fyri stovnar uttanfyri Landsnet, og er galdandi í 3 ár, til og við 31. desember 2024.

Sáttmálin er fyri útvaldar vørur, og fleiri vørur eru komnar afturat síðan fleiri eru á veg. Merkið sum vann er HP, Hewlett Packard. Í løtuni er gongdin at m.a. støddin á skermum fara frá 16:9 til 16:10 og 3:2

Hví er fyrsti sáttmálin ein sáttmáli um telduútgerð ? Grundin er, at tað eru so nógv ymisk merkir og modell. Við at standardisera verður skjótari bæði at gera teldurnar klárar og at veita hjálp við teldunum, og at keypa umvegis avtaluna, ger at keyp eisini verða bókað rætt beinanvegin.

Kim vísti hagtøl fyri, hvat er keypt, og hvussu nógvar eindir stovnarnir hava keypt. Svik ? M.a. at vørur eru skrásettar, men hoyra ikki heima har, enn. Av 439 vørum eru seks vørur keyptar uttanum KT Húsið. Eitt undantak er gjørt, og tað er loyvi at biðja um undantak, og tað kunnu vera góðar orsøkir til tað. Næsti rammusáttmáli, ætlanin er at gera, verður um dátusamskifti.

**Birgir av Steinum**, komandi verkevni
*Trygd* - Váðamyndin er broytt, m.a. er Royal Greenland álopið av ransomware, í mars vórðu eitt ella fleiri ráð rakt, og fyrradagin gekk tað út yvir grønlendska heilsuverkið. Vit mugu altíð vera á varðhaldi. Um vit skulu hava døgnvakt allar dagar í árinum, mugu tað verða 6 - 8 persónar í toyminum, tá hugsa verður um, at fólk skulu í feriu og tílíkt.

Trý útistandi tilmælir og VPN. Størri og størri krøv verða sett til skjalfesting, og NIS2 kemur væntandi eisini at ávirka okkum. Arbeiða saman við stovnunum um hetta, so vit kunnu fáa meira vitan hjá hvørjum øðrum. Skjalfestingin, sum vit hava nú, er mest til egna nýtslu og er ikki so væl egna at gera eina skoðan eftir.

*Sikker email* - Um tit ynskja tað, setið tykkum í samband við KT Landsins. Hetta er ætlað til stovnar, ið hava brúk fyri at kryptera dátur. M.a. til dokumentatión, har dátur verða sendar til stovnar, ið ikki eru á Landsneti.

*Netkonsept* - Bjarni kemur at siga meira um tað.

*Microsoft lisenspakkin* - Vit mugu tryggja okkum, at vit fáa meira úr loysnunum, sum eru í lisenspakkanum frá Micorsoft. Skipað hevur verið fyri skeiðnum, men vit kundu hugsað okkum at komi út og ráðgivið stovnunum í amboðunum, t.d. Teams, Planner og Power platforminum.

*Skúlanet* - Skúlanet er ætlandi liðugt í 2023. Vit fara at arbeiða við at leingja sáttmálan við høvuðs-veitararnar Elektron og Formula, og hetta kemur nokk at krevja nakað av tíð hjá okkum komandi tíðina.

*Hagtøl* - Á Landsneti eru 60 stovnar á 200 støðum, í 8 londum og yvir 3000 brúkarar. KT Skivan stovnaði í 2021 448 brúkarar, fekk 11.880 uppringingar, gjødi 424 teldur klárar og hjálpt 1951 ferðir til at gera nýggj loyniorð.

**Leif**
Greiddi frá, at nøgdsemiskanningini vísti, at flestu eru nøgd við skipanirnar frá Microsoft, men onkur spurdi um Apple, og at Heri á Rógvi kom at siga meira um sjálva kanningina seinni. Mint varð á vera meira varin nú, tí vit í Føroyum eisini, kunnu verða útfyri cyberálopum frá m.a. Russlandi.

**Denis Pertsev**, The War on Ukraine and Global Cyber Threats
Fleiri cyperálopum vóru á Ukraina áðrenn innrásina 24. februar. Mikudagin 16. februar vóru fleiri álop á bankar og størri fyritøkur, so at fyritøkur ikki kundu gjalda løn úr bankunum í Ukraina. Tríggjar dagar seinni vórðu dáturnar endurstovnaðar, so tey fingu arbeitt aftur. Tí er syrgt fyri at backup liggur í øðrum londum í Europa.

Fyri 5 árum vórðu nógvar smærri fyritøkur álopnar, og tær mistu alt og máttu steingja, tí tær fingu ikki endurstovnað sínar dátur. Tey vistu ikki, hvør skyldaði teimum pening, og hvat tey høvdu goldið til veitarar. Fyri ikki at missa kundar, er neyðugt at til bera at endurskapa sínar dátur, og tí er tað skilagott at hava tað liggjandi á fleiri støðum.

Hermenninir, sum hava verið staddir í Mariupol, hava brúkt StarLinks fyri at samskifta við fólk verðini uttanfyri, og Leif helt fyri afturat, at tilbúgvingin má verða soleiðis skipað, at alt data ikki liggur í einum stað.

**Mortan Olsen** og **Zakarias Thomassen**, Planner á Teams
Mortan Olsen og Zakarias Thomassen á Landsverki vístu, hvussu teir brúka Planner í dagligdegnum. Fyrr varð mest Excel brúkt, og tá høvdu teir og hini úti á vegunum onga ávirkan á planlegging og máttu fáa boð pr. telefon um, hvat skuldi verða gjørt. Við Planner er nógv betri skjalfesting, fyri hvat skal gerast, og til ber at stovna uppgávur beinleiðis á telefonini, og skráseta tá arbeiðið er liðugt.

Til ber eisini at síggja støðuna á uppgávum, ið eru í gongd úti á vegunum. Fólkini stovna nú sjálvi uppgávur, eisini á telefon og kunnu skjalfesta, hvussu tað sá út áðrenn og aftaná. Til ber at viðhefta m.a. myndir, pdf skjøl, skráseta deadlines og aðrar upplýsingar. Hetta hevur givið ein nógv betri yvirlit yvir hvat er á skránni og betri verkgongd.

Uppgávurnar eru býttar upp í økir, so hvør einstakur kann síggja egnu uppgávur og hvørjar uppgávur annars eru á sínum øki. Sæst hvat er í gongd og hvat skjótt skal í gongd.

Leif spurdi Mortan, um hvussu skjótt hetta er at seta í verk. Mortan segði, at hann setti tað upp, og fekk formenn við uppá tað, m.a. fyri at sleppa undan “gulum seðlum”. Eisini arbeiðsfólki á vegunum eru glað fyri hesa skipanina. Nógv av teimum brúka “Reypilistan” fyri at síggja og vísa á, hvat tey hava gjørt.

**Aslaug Gisladóttir** og **Randi Á. Jakobsen**, Skjalhald sum tænasta í Landsneti
Aslaug legði fyri, og greiddi frá, hvør hon er, og hvør hennara uppgáva er í hesum sambandi.

Greiddi frá, hvussu gingið hevði við “kick off” fundum og síðan at fáa stovnarnar á Skjalhald. Higartil hava 790 brúkarar stovnað gott 40.000 mál, 161.000 skjøl og næstan 300.000 fílur. Uppstiganin varð ein størri broyting enn fleiri av stovnunum væntaðu, og hetta gjørdi, at nøkur hildu, at alt ikki riggaði sum tað skuldi. Men nógvar av hesum broytingum høvdu verið gjørdar, um tey sjálvi høvdu uppstigað.

Tá øll komu á somu loysn, sá tað út til, at tað var atgongd uppá tvørs av stovnum í arkivinum. Hetta vísti seg tíbetur bara at vera, tí stovnar ikki høvdu rudda upp í atgongdunum, tá fólk vóru farin úr starvi ella vóru flutt til annan stovn at arbeiða. Tá hugt varð eftir øllum atgongdarbólkunum sást, at atgongdarbólkar vóru, eingin “aktivur” brúkari var. Hetta hevði við sær, at eingin brúkari á Skjalhaldi sá tær sakirnar. Sostatt fingu vit gjørt tey varug við, at tað er umráðandi ikki at hava alt ov nógvar atgongdarbólkar.

Lærdómurin frá hesi verkætlanini hevur m.a. verið, at gott hevur verið at vegleiðingar eru gjørdar við hjálp frá arkivarum, og hvussu neyðugt tað er við brúkarastýring. Síðan takkaði Aslaug øllum fyri hjálpsemið og tolsemið, ið stovnar og brúkarar hava haft.

Randi tosaði um fyrimunir við at vera á eini felags loysn. M.a. at øll brúkarahjálp er íroknað gjaldið fyri standard tænastuna. Eisini eigur avhendingin til Tjóðskjalasavnið at verða bíligari, tí tá tað verður bjóða út, verður alt avhenda samstundis, tí talan er um eitt útboð í staðin fyri 26.

Væntandi verður eisini bíligari at gera vevtænastur, tá vevtænastan í Skjalhaldi er gjørd, tí tá skulu stovnarnir bert stovna sína síðu av vevtænastuni.

Brúkarabólkuer er stovnaður, har tosað verður um broytingar, ið ynski eru um , og kunna verður um, um okkurt serligt er. Og greitt var frá um menningina, sum er í gongd, og um framtíðarætlanirnar.

**Leif Abrahamsen**, Trygdarpakkin
SLA er gjørd við Formula, og mesta av trygdini liggur hjá Gjaldstovuni og ikki úti á stovnunum longur. Tó áseta stovnarnir atgongdir fyri brúkararnar. Stovnarnir læra brúkararnar um trygd.

Tølini eru fyri skoðanina fyri 2020 eru gjørd í 2021. Tølini eru býtt upp eftir teimum ymisku greinunum, sum grannskoðað verður eftir.

Tilbúgvingin hevur 12 ymiskar hendingar, avtalur við veitarar eru ikki altíð í lagi, og stovnarnir eru kunnaðir um hvørji átøk eiga at verða gjørd. Higartil eru mest smærri stovnar grannskoðaðir, og nú verður farið undir at grannskoða teir størru stovnarnar. Sannlíkt er at stovnarnir ikki verða skoðaðir á hvørjum ári, og tað sæst at tað verður betri og betri. Av tí at nógvar hóttanir eru, er betri ikki altíð gott nokk, so tað mugu vit eisini minna okkum á.

**Bjarni Fríðberg**, Nýtt net konsept
Í sambandi við útboðið av Skúlaneti sást, hvat vit eisini kunnu brúka á Landsneti, og hvat kann verða gjørt fyri at gera tað lættari at umsita Landsnet. Tí fer Landsnet at hava eina sentrala stýring av firewall'um. Í løtuni ber ikki til at hava somu stýring av switch'um. Tá talan ikki er um sentrala stýring, er tað torførari at finna feilir. Við eini sentralari skipan, ber til at finna hvar tingini eru, og tá er eisini møguligt at síggja ein feil, so skjótt sum hann hendur.

*Zerotuch* ger at veitarin sleppur undan at stilla útgerðina frammanundan, tí tólini sjálvi loysa uppgávuna.

*NAC, Network Access Control* syrgir fyri, at teldur, ið ikki eru dagførdar, verða settar í eina støðu, har teldan skal dagførast, áðrenn hon sleppur longur inn á netið. Tað ber til at avbyrgja teldur, ið frammanundan ikki eru góðkendar á Landsneti at sleppa inn á Landsnet, sokallað 'Segmentering'.

Ávís tól verða ikki eru dagførd. Switchir verða vanliga ikki dagførdar, so tær hava eina ávísa livitíð, og so verða tær skiftar út.

*Network as a service* verður m.a. goldið við at rinda eitt mánaðargjald. Tað er ikki ein stór íløga men heldur vanligur rakstur.

Leif viðmerkti, at network as a service, kemur at broyta tingini við at tað verður betri at dagføra hardware. Okkurt av tí elsta er 10 ára gamalt, av tí sum er á Landsneti.

**Leif Abrahamsen**, Power BI, hvat ætlar Gjaldstovan
Power BI er eitt gott amboð til at arbeiða við stórum dátumongdum, m.a. úr BSL, og Gjaldstovan fer at læra brúkarar at brúka Power BI. Amboðið er gott til rapportir, sum man kann vísa og deila við onnur. Fyrst verða stóru stovnarnir bjóðaðir við at gera rapportir, sum gott er at hava sum vegleiðingaramboð. Vit koma við einum road-map og fyrsta umfari verður tað GL dátur. Hetta verður stýrt við atgongdum, har tú bert sær tey stovnsnr., tú hevur rætt at síggja í BSL. Í 2023 koma vit at vísa øllum stovnum, hvussu hetta kann gerast.

**Spurningar á SLI.DO**
Skjalhald - Er ov trupult at leita, og kunnað verður um loysn seinni fyri arkivið.
Trygd - Vit gera tað sum vit kunnu.
Stýring av governance

Landsnet - Benchmark varð gjørd í mun til prís fyri nøkrum árum síðan, og nú er ein nøgdsemiskanning gørd, sum Heri á Rógvi leggur fram.

**Heri á Rógvi**, Nøgdsemiskanning
Fólk, ið hava havt samband við KT Skivuna innanfyri eina ávísa tíð, stjórar og KT ábyrgdarar hava svarað kanningini. Seinastu svarini komu í vikuni. Tí hevur ikki verið so góð tíð greina svarini. Íalt 233 fólk svaraðu spurningum, og av teimum vóru 59 stjórar, 33 KT ábyrgdarar, 25 úrvalsbrúkarar og 116 aðrir brúkarar, og á leið helvt um helvt kvinnur og menn.

Sum heild eru brúkararnir væl nøgdir við hjálpina frá KT Skivuni. Tó hava Apple brúkarar viðmerkt, at KT Skivan ikki er so glað fyri Apple teldur, men tey eru tó sum heild nøgd við Landsnet.

Kanningin vísir, at nógv brúka nógva tíð á telduni, tá tey eru til arbeiðis, tí er umráðandi at teldur og net virkar. Tað eru tó fleiri, sum ikki vita nakað um Brúkararáðið og ikki vita hvør er teirra umboð í ráðnum. Neyðugt er við meira kunning til allar brúkarar, so fleiri vita hvat brúkararáðið er og arbeiðir við.

Kanningin er m.a. bólkað á, hvønn leiklut tú hevur, um tú er stjóri/leiðari, KT ábyrgdari, úrvalsbrúkari ella vanligur brúkari. Vísir seg, at tað var í øllum bólkum, at vitanin um Brúkararáðið var lítil, og serliga millum vanligar brúkarar.

Ein stórur munur er á hesi og øðrum kanningum, ið Lóður hevur gjørt, er, at nógvar av viðmerkingunum er øgiliga góðar, tí talan eru um viðmerkingar, ið stovnurin kann gera nakað við.

**Leif Abrahamsen**, Samanumtøka
Brúkararáðið ger eitt gott arbeiði.
Nógv er á skránni hjá Landsneti
Planner er ein løtt og einføld loysn.
Hardware á Skúlanetið er alt as a service, t.e. at ikki er neyðugt at keypa útgerðina, eingin íløga.
Gjaldstovan skal hava nýggja heimasíðu, og verkætlanin verður boðin út í nærmastu framtíð.
Generel trygdaravtala fyri allar skipanir á landsnet, eisini BSL
Sikker mail verður brúkt á Vinnustovninum. Tú brúkar Outlook sum vant, men eitt Sikker mail plugin ger, at brúkarin sær, um móttakarin hevur Sikker email ella ikki.
Munur er millum Skúlanet og Landsnet. Standa saman um at reka KT, og største munur er, at Skúlanet byrjar í cloud. So tað eru Ikki nógvar servarar á skúlunum, tøknin er lættari at arbeiða við, og nógv á skúlunum koyrir í dag á internetnetinum.

Skrivari: Randi Á. Jakobsen
Myndamaður: Høgni Poulsen
Teknikari: Helgi Hvannastein